# Føroya Banki sítt besta úrslit nakrantíð

**Árið í fjør gjørdist eitt sjáldsama gott ár fyri Føroya Banka. Bankin hevði eitt yvirskot áljóðandi 210 mió kr, og nú er so gott sum liðugt við afturføringum frá kreppuni. Bankin er harafturat komin á eitt reelt støði, og er mestsum klárur at privatisera**

ROKNSKAPUR
*Heri á Rógvi*



*Jørn Astrup Hansen hevur alla orsøk til at fegnast, tí Føroya Banki kundi vísa á sítt besta úrslit nakrantíð fyri 2001.*
*Mynd: Jens Kristian Vang.*

–Hetta er besta árið hjá bankanum nakrantíð.

So avgjørdur er Janus Petersen, stjóri í Føroya Banka, tá hann verður biðin um at meta um ársúrslitið fyri árið í fjør, 2001. Jørn Astrup Hansen, forstjóri í Føroya Banka, tekur fult undir við sjónarmiðinum hjá Janusi, og sum heild eru stór smíl á varranum hjá teimum báðum stjórunum, og hetta er tað eisini orsøk til.

Føroya Banki hevði áðrenn skatt eitt yvirskot áljóðandi 209,7 mió kr. Eftir skatturin er goldin, gevur hetta eitt yvirskot áljóðandi 168 mió kr. Í sjálvum sær er hetta tal ikki størri enn árini frammanundan, men tað er veruliga serstakt, tá hugt verður eftir. hvat yvirskotið stavar av. Orsakað av sváru kreppuárunum fyrst í hálvfemsunum hevur bankin kunnu innført burturleggingar aftur í roknskapin frá teimum góðu 4 mia, sum vórðu skotnar inn í bankan í sambandi við kreppuna. Ì 2000 vórðu 171 mió av yvirskotinum úrslit av burturleggingum, ið vóru góðskrivaðar. Í 2001 var hetta talið "einans" 25,3 mió, og roknað verður við, at í 2002 verður hetta tal á leið 0. Tað er eisini í burturleggingunum at finna orsøkina til, at Føroya Banki hevur kunnað víst á so ovurhondsstór avlop seinastu árini, og nú er so gott sum liðugt við tí. Tískil metir leiðsla bankans, at talan er um eitt tað besta árið hjá bankanum nakrantíð. So at siga á øllum økjum er vøkstur at hóma.

–Føroya Banki er nú komin burturúr kreppuni, og nú er talan um eitt reelt yvirskot, og hetta ger, at vit kunnu hyggja heilt øðrvísi upp á Føroya Banka, sigur Jørn Astrup Hansen.

Leiðslan fegnast stórliga yvir, at mann nú kann fara at hyggja eftir Føroya Banka sum einhvønn vanligan banka, og nú bankin hevur lagt sjógv til kreppuárini, er støðan rættiliga góð.

–Úrslitið hjá okkum fyri hvørja kostnaðarkrónu er 2,55 kr., og hetta er tað mesta í kongaríkinum, sigur Jørn Astrup Hansen.

Bæði útlán og innlán hjá Føroya Banka er voksin heilt munandi. Innlánini eru voksin við 20,7% til 3.941 mia. Ùlánini eru voksin við 6,3% til 3,36 mia. Góða gongdin í samfelagnum fær ábyrgdina fyri hesa góðu gongd.

–Vit rokna ikki við, at fáa eitt eins gott úrslit fyri 2002, men tað verður væntandi framvegis eitt gott úrslit, og vit kunnu siga, at tað stendur væl til hjá okkum, sigur Janus Petersen.

Eginpeningurin hjá bankanum 1,4 mia kr. Ognirnar hjá bankanum liggja um 6 mia, og bankin hevur síðani 1994, tá bankarnir vórðu lagdir saman útlutað 777 mió kr. til partaeigarar sínar. Góðar 2,4 mia hevur landið tilsamans vunnið burturúr Føroya Banka, síðani 1994. Goldnar verða 75 mió til partaeigararnar, og landið vinnur eisini 42 mió kr. í skatti.

–Føroya Banki skuldi nú verið klárur til privatisering, men óvist er við keypara, sigur Jørn Astrup Hansen.

# Ungdómspolitisk ráðstevna

**Um vikuskiftið skipa politisk ungmannafeløg fyri ráðstevnu á Háskúlanum. Endamálið er at skapa áhuga fyri feløgunum og politikki millum ung**

RÁÐSTEVNA
*Heri á Rógvi*




*Jóannes Vitalis Hansen og Bartal Nolsøe Poulsen eru millum teir, ið hava fyrireika Nýtt Hugfar, ið verður á Háskúlanum um vikuskiftið.*
*Mynd: Jens Kristian Vang.*

Háskúlin verður um vikuskiftið karmur um eina ungdómspolitiska ráðstevnu. Tað eru fimm politisk ungmannafeløg, ið skipa fyri ráðstevnuni. Ráðstevna hevur heitið Nýtt Hugfar.

–Endamálið við stevnuni er at vekja áhuga fyri politiskum arbeiði millum ung, og vit vilja eisini eggja ungum til at koma uppí politiskt arbeiði, sigur Jóannes Vitalis Hansen, ið er formaður fyri Unga Tjóðveldi og hevur verið við til at fyrireika stevnuna.

Ráðstevnan er fyrst og fremst ætlað ungum, ið ikki eru limir, soleiðis at tey kunnu gera sær eina mynd av, hvussu feløgini eru og hvat tey hava at siga. Tað skal tó ikk skiljast soleiðis, at tey, ið eru limir, skulu halda seg vekk, tí hesi skulu greiða øðrum.

Tiltakið verður leygardagin á Háskúlanum og byrjar kl. 10.00, og fyrireikararnir heita á øll, um at vera har frá byrjan.

Fyrst á skránni leygarmorgunin er, at tey ymsu feløgini greiða frá sínum felag. Í døgurðasteðginum fara tey luttakandi oman á Sjómansheimið í Havn, sum saman við Restorffs stuðlar tiltakinum.

Seinnapartin heldur Birgir Kruse ein fyrilestur við evninum áhugafeløg og smátjóðir. Høvið verður at seta Birgir spurningar.

Kl. 15 verður kjak á skránni, ið Høgni Mohr og John Brian Hvidtfeldt skulu halda skil á. Innlegginum koma frá framløgunum um morgunin, og høvið verður at kjakast rættiliga breitt, verður breitt.

Kl. 21 verður tónleikacafé, har Terji Ramussen, Unn Patursson og Búi Dam fara at spæla.

Fyrireikararnir vóna at síggja nógv fólk. Tiltakið varð eisini roynt í fjør, og tá var undirtøkan sera góð.



# Ætlan og stýring mest týðandi í oljumenningini

MENASFRÁGREIÐING
*Jan Müller*



*Malan Marnersdóttir, rektari á Fróðskaparsetrinum, John Christensen, stjóri í Menas og Hjarnar Djurhuus, stjóri í BP*
*Mynd Jens K. Vang*

- Tað er ikki okkara uppgáva at siga føroyingum, hvat tit skulu gera ella geva tykkum góð ráð. Tað eru føroyingar sjálvir teir bestu til at gera. Vit vilja við hesi frágreiðingini fyrst og fremt vera við til at stimbra og menna orðaskiftið um eina komandi oljutilgongd í Føroyum segði stjórin í Menas, John Christensen, tá fyrsta frágreiðing av sínum slag um samfelagsligu árinini av eini oljuvinnu varð almannakunngjørd í Havn í gjár.

John Christensen helt fyri, at henda frágreiðing skal bara skiljast sum ein byrjan, sum eitt grundarlag undir einum víðari kjaki. Uppá fyrispurning hvat hann heldur vera mest týðandi læruna, ið føroyingar kunnu gera sær við at lesa hesa frágreiðing segði Jerseybúgvin, at tað er at hava eina greiða og skipaða ætlan fyri gongdina og at kunna stýra henni – strategi og control - vóru lyklaorðini í hansara fatan av tí støðu, sum eitt lítið oyggjaland sum Føroyar eru í, nú farið verður inn í oljuøldina. Sjálvur metti hann, at orðaskiftið í Føroyum er longu komið væl áleiðis, og tí vónaði hann, at henda kanningin kundi vera enn eitt íkast til kjakið. Hann eins og rektarin á Fróðskaparsetrinum, Malan Marnersdóttur, viðgekk, at tað høvdu verið samstarvs- og samskiftistrupulleikar í arbeiðinum, men metti hann tó, at úrslitið var arbeiðinum var gott. Tó vónaði hann, at fólk nú fóru at lesa frágreiðina og finnast at henni, har hetta er uppá sítt pláss.

John Christensen, sum sjálvur er oyggjabúgvi, hann er føddur á oynni Jersey, segði, at ætlanin við kanningini er at upplýsa og eggja til orðaskifti í Føroyum um, hvussu farast kann fram í sambandi við útbygging av einari oljuvinnu, um olja í rakstrarverdum nøgdum verður funnin. Í kanningini verður ásannað, at árinini av einari kolvetnisvinnu á ein lítlan oyggjabúskap kunnu verða viðgjørd á tveimum stigum. Í fyrra lagi er tørvur á at kanna, hvørjar beinleiðis avleiðingar oljuleitingar- og útvinningarvirksemi umframt avriggingin av hesum virksemi hava við sær. Harnæst er tørvur á at kanna tey møguligu árinini av inntøkunum frá skatti og avgjøldum, sum væntandi fara at koma, so títt og knapt sum farið verður undir at framleiða og útflyta olju. Um ein oljuvinna verður útbygd í Føroyum, fer hon væntandi at hava djúptøkna ávirkan á tann føroyska búskapin og eisini á tann vanliga lívsháttin, ta serligu mentanina, samfelagsbygnaðin og á umhvørvið. Royndir frá øðrum oljuøkjum vísa, at hesar broytingar kunnu verða gagnligar, um avgjørt verður, frá tí at oljuvinnan byrjar, at nýta oljuríkidømið til at røkka langtíðar samfelagsmálum.

- Tað er ikki ætlanin við kanningini at siga, hvussu føroyingar skulu bera seg at, og eiheldur verða givin ráð um, hvussu farast skal til verka í sambandi við útbygging av einari oljuvinnu. Kanningin lýsir ymsar møguleikar, sum kunnu vera við til at skapa grundarlag undir einum orðaskifti um, hvussu farast skal fram. Eisini verða hepnar og minni hepnar royndir aðrarstaðir í heiminum lýstar. Kanningin viðurkennir kortini, at sereyðkennini við tí føroyska samfelagnum gera tað neyðugt at finna fram til serstakar mannagongdir, sum semja eigur at verða fingin um eftir vælgrundað og skilagott orðaskifti segði John Christensen frá Menas Associates Limited. Lesið meira um tíðindafundin og frágreiðingina í næstu viku.

